## Góðtaka minni løn

Ein kanning, sum lærdi háskúlin í Reykjavík hevur gjørt, vísir, at bæði kvinnur og menn eru av teirri áskoðan, at kvinnur eiga at góðtaka at fáa minni løn enn menn fyri sama arbeiði. Kanningin umfatar ráðgeving við starvssetanir. Hon vísir, at ráðgevandi kvinnur mæla øðrum kvinnum til at taka við størvum, sjálvt um tær fáa upp í 15 prosent minni løn enn menn. Ráðgevandi menn mæla kvinnum til at góðtaka upp í 20 prosent lønarmun.



## Fingið leitiloyvi

Kanadiska oljufelagið Husky Oil Operations hevur nú fingið formligt loyvi til at leita eftir olju og gassi í undirgrundini við Disko-víkina í Grønlandi. Felagið fekk loyvið frá Kim Kielsen, landsstýrismanni seinnapartin í gjár. Kanadiska felagið hevur fingið tvey leitiloyvi saman við grønlendska felagnum Nunaoil. Grønlendska heimastýrið hevur latið átta leitiloyvi, sum hvørt sær eru millum 8.000 og 14.000 ferkilometrar til víddar.

# Kringvarpið enn í tveimum

**Hóast stjórin í Kringvarpinum, Jógvan Jespersen, vil vera við, at miðlarnir eru undir einum hatti, so er tað kortini sannroynd, at tvey lið við hvør sínum redaktøri verða send til Oyggjaleikirnar**

SAMANLEGGING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tá Sjónvarpið og Útvarpið fyri tveimum árum síðani vórðu løgd saman, var eitt av tungu argumentunum rationalisering. Men hóast ár eru gingin, tykist eingin onnur sparing vera farin fram enn eitt stjórastarv.

Upp undir Oyggjaleikirnar hevur verið lagt upp til økt samstarv millum gomlu stovnarnar, men leiðslan í Kringvarpinum vísti hesum frá sær við teirri grundgeving, at tíðin ikki er búgvin til slíkt samstarv enn.



*Útvarpsmanningin og sjónvarpsmanningin ganga í tveimum bólkum. Men tey fara at halda redaktiónsfundir saman niðri á Rhodos*

- Tað er ein avgerandi fyritreyt, at hølisspurningurin verður avgreiddur, áðrenn prosessin kann halda fram at samansjóða útvarp og sjónvarp. So í løtuni bíða vit eftir einari politiskari avgerð, sigur Jógvan Jespersen, kringvarpsstjóri.

Hann sigur seg heldur ikki kenna annað til nakra samansjóðing av stovnunum báðum enn eitt uppskot frá einum starvsfólki í sjónvarpinum. Har var lagt upp til tættari samstarv undir Oyggjaleikunum, men sum kringvarpsstjórin skilti tað, var tað ein treyt, at hetta samstarv helt fram eftir OyL eisini, og tað var hetta, sum leiðslan ikki metti tíðina búna til.

Tað skilst kortini á starvsfólki á bæði sjónvarpinum og útvarpinum, at ein samansjóðing av resursunum er eitt gott hugskot. Ikki tí, at starvsfólkið sum so er áhugað í rationaliseringum, men tí at tey fegin vilja bjóða hyggjarum og lurtarum bestu tænastuna.

### Hølini avgerandi

Hvussu enn verður hugt eftir tí, so er tað ein sannroynd, at útvarpið sendir fimm fólk til Rhodos og sjónvarpið sendir sjey. Hartil kemur ein webredaktørur, sum eftir hvat skilst verður kringvarpsstjórin sjálvur.

Jógvan Jespersen sigur, at teir hesaferð ætla at gera nógv meiri burtur úr internetinum, og fara at leggja bæði bandaðar frágreiðingar og filmsbrot út á heimasíðuna.

Hann sigur eisini, at hóast ein redaktørur verður fyri útvarp og ein fyri sjónvarp, so fara tey kortini at hava felags redaktiónsfundir undir oyggjaleikunum.

- Tú kanst siga, at hesi tvey fyrstu árini eru farin til at fáa eina rúgvu av praktiskum tingum upp á pláss, men avgerandi fortreyt er, hvussu vit skulu húsast. Verður tað í tveimum hølum sum nú, so er vandi fyri, at talan framvegis fer at verða um tveir miðlar. So tað er alneyðugt, at vit fáa at vita frá politikarunum, hvat teir ætla í so máta, sigur Jógvan Jespersen.

Ikki fyrr enn hetta er greitt ber tað til, sambært kringvarpsstjóranum, at samansjóða programmdeildirnar meiri.

# Hølisviðurskiftini avgreidd í heyst

**Politisku signalini hava verið púra greið. Jørð er keypt uppi í Sortudýki at byggja út gomlu útvarpshúsini, og uppskot um verklagslóg verður lagt fyri tingið tíðliga í heyst, upplýsir Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður**

KRINGVARP
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Ætlanin við at samanleggja útvarpið og sjónvarpið hevur verið púra greið alla tíðina. Grundin var rationalisering bæði so og so. Og tað merkir eisini samanlegging reint fysiskt.

Tað sigur landsstýrismaðurin við ábyrgd av kringvarpinum, Jógvan á Lakjuni.

Tað gevur væl eisini eina greiða ábending um júst hetta, at landsstýrið útvegaði øki at byggja gomlu útvarpshúsini út á uppi í Sortudýki.

- Støðan hjá mær hevur alla tíðina verið greið, tað hevur alla tíðina verið meiningin, at stovnarnir skulu leggja saman fult og heilt, sigur Jógvan á Lakjuni.

Hann viðgongur tó, at tað hevur gingið longri tíð enn neyðugt at fáa alt upp á pláss, tí longu í vár hevði hann málið fyri á landsstýrisfundi, men tá bleiv tað ikki avgreitt, tí ynski var um at seta hesa útbyggingina í eina langtíðar íløguætlan.

- Men eg havi fingið politiska vissu fyri, at málið verður avgreitt nú í heyst tíðliga, sigur Jógvan á Lakjuni.

### Selja Vørðsluna

Sostatt er politisk semja í málinum, og alt, ið nú vantar, er at fáa tað ígjøgnum løgtingið. Alt er púra klárt og útbyggingin er projekterað, so tá ein verklagslóg er samtykt, skuldi verið klárt at farið undir útbyggingina.

Um gomlu kappingarneytarnir longu nú kundu arbeitt betur saman, hevur landsstýrismaðurin onga viðmerking til. Men hann vísir á, at tað eftir hansara tykki hevur gingið væl við samanlegginingini, og at umsitingin nú er savnað uppi í Sortudýki.

- Viðvíkjandi hølisviðurskiftunum veit eg, at teir eru eitt sindur ótolnir, tí alt hevur verið klárt frá teirra síðu í eina tíð nú, sigur Jógvan á Lakjuni.

Alt tekur tíð. Og samstundis er nógv byggivirksemi í landinum, og tað er ein orsøk til, at flokkarnir vildu hava útbyggingina av útvarpshúsunum við í eina langtíðar íløguætlan.

Hinvegin skuldi fíggingin verið lættari at avgreitt, tí tað liggur í ætlanunum at selja bygningarnar í Vørðsluni, og hetta kann í hvussu er fíggja ein part av útbygginini í Sortudýki.

Og gongur sum landsstýrismaðurin ætlar, verður farið undir hetta arbeiði í heyst.



*Hølisviðurskiftini hjá Kringvarpi Føroya verða avgreidd í heyst, sigur Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður*